# Double up á Landssjúkrahúsinum

**Við síðunar av maskinverkstaðnum og matarhøllina á Landssjúkrahúsinum er ein lítil nýggjur bygningur í holt við at taka skap. Her inni standa nú tveir spildurnýggir el-motorar, sum skulu forsýna Landssjúkrahúsið við streymi um SEV svíkur**

ÚTBYGGING
*Ingrid Bjarnastein*



*Teir gomlu motorarnir á Landssjúkrahúsinum. Hvør motorur er 180 kVA og við teimum noyðist ein at velja burturúr, hvør skal fáa streym og hvør ikki.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað kemur fyri, at SEV svíkur, og tá kann tað fáa álvarsamar fylgjur fyri til dømis Landssjúkrahúsið um ein sjúklingur liggur í respirator. At tveir nýggir motorar nú skulu forsýna allar bygningarnar hjá sjúkrahúsinum við streymi um hetta kemur fyri, vil tó ikki siga, at bygningarnir hava ligið uttan streym frammanundan. Hesir báðir nýggju motorarnir eru bara fleiri ferðir størri og hava nógv størri orkuføri enn teir gomlu.

– Her á Landssjúkrahúsinum hava vit eitt elverk, sum er eins gamalt og Landssjúkrahúsið sjálvt. Tveir motorar á 180 kVA hvør hava øll hesi árini havt til uppgávu at forsýna Landssjúkrahúsið við streymi um SEV skuldi svikið, greiðir Jóan Símun Saltá, leiðari á maskinverkstaðnum frá.

– Fyri eini tíð síðani gekk annar av hesum motorunum fyri, og í sambandi við stóru útbyggingina á Landssjúkrahúsinum er valt at eisini a-jourføra elverkið. Nú hava vit fingið tveir motorar, sum eru 800 kVA hvør, og megnar ein av hesum motorunum at geva streym til allar bygningarnar á Landssjúkrahúsinum.

## Framstig

At fáa tveir so stórar motorar er væl at merkja eitt stórt framstig fyri Landssjúkrahúsið.

– Tá SEV er gingið fyri, hava vit verið noyddir til at prioritera, hvør skal fáa streym og ikki, og bara neyðforsýningar sleppa framat. Við teimum nýggju motorunum verður hetta als ikki nakar trupulleiki, og um annar av motorunum skuldi gingið fyri, so megnar hin at yvirtaka alla nýtsluna, sigur Jóan Símun Saltá.

Gomlu motorarnir á Landssjúkrahúsinum eru frá eina ferð seinast í sekstiárunum. Teir eru alt ov smáir og megna als ikki at uppihalda núverandi nýtsluni hjá Landssjúkrahúsinum.

– Við nýggju moturunum koma vit sjálvandi at brúka meira, men vit sleppa undan nógvum trupulleikum, fortelur leiðarin á maskinverkstaðnum.

– Síðani annar motorurin gekk fyri, hava vit leigað eitt anlegg frá Skipasmiðjuni.

Dagliga fær Landssjúkrahúsið streym frá SEV, men frá miðjum august, tá nýggju motorarnir skulu setast í gongd, verður double up á Landssjúkrahúsinum um SEV skuldi svikið.

Arbeiðið byrjaði í september mánaða í fjør, og hevur tað tikið eitt sindur langa tíð, av tí, at tað er ikki so lætt at spreingja ímillum tveir bygningar. Og at fáa sjálvar motornarar niður var ikki bara sum at siga tað, tí teir viga 10 tons hvør. Men hetta kláraði stóri kranin á skipasmiðjuni uttan nakran trupulleika.

– Vit gleða okkum nógv til at fáa nýggju motorarnar at virka, tí tað er uppá tíðina, at hetta verður dagført, sigur Jóan Símun Saltá at enda.

*Tveir spildurnýggir motorar fara í gongd um miðjan august í ár. Hesir skulu syrgja fyri, at Landssjúkrahúsið fær streym um SEV skuldi svikið. Hvør motorurin er 800 kVA og megnar ein av teimum, at forsýna allar bygningarnar hjá Landssjúkrahúsinum við streymi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*








# Ølsølur skaða trivnaðin

**Ølsølurnar hjá bryggjaríunum gera tað ov lætt at fáa hendur á rúsdrekka og skaða umhvørvið, har tær liggja. Tí áttu tær ikki at ligið í bygdum øki, heldur familju- og trivnaðarmálaráðharrin, sum helst sá at ølsølurnar hjá bryggjaríunum vórðu afturlætnar. Trupulleikin er ikki sølurnar, men keypararnir, siga bryggjaríini.**

RÚSDREKKASØLA
*Rúnar Reistrup*



Nýggi familju- og trivnaðarmálaráðharrin nevndi í Blákrossblaðnum herfyri rúsdrekkasølurnar sum hóttanir ímóti trivnaðinum í økjunum, har tær liggja. At ráðharrin fór so langt sum at siga at ølsølurnar hjá bryggjaríunum áttu at verið niðurlagdar, soleiðis at øll søla av sterkum løgi kann fara fram ígjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins, hevur ørkymlað tey bæði føroysku bryggjaríini.

Einar Waag, stjóri fyri Føroya Bjór, dylir ikki fyri, at tað hevði verið ein smeitur, um bryggjaríini ikki sluppu at selja út av goymslum sínum.

- Vit høvdu nokk klárað okkum, men tað hevði gjørt umstøðurnar hjá bæði okkum og okkara viðskiftafólki verri, sigur stjórin á Føroya Bjór.

## Nógv á samvitskuni

Øl verður selt fyri sama prís úr goymslunum hjá bryggjaríunum sum í Rúsdrekkasølu Landsins. Rúsdrekkasøla Landsins fær ein ávísan vinning av hvørjari seldari ølfløsku, og bryggjaríini fáa soleiðis størri vinning av tí øli, sum verður selt úr egnum goymslum.

- Tað hevði rakt okkum ógvuliga meint fíggjarliga, um vit ikki sluppu at selja øl úr goymslunum. Spurningurin er, um vit yvirhøvur høvdu hórað undan, sigur Óla-Svenn Nolsøe, stjóri fyri Restorffs Bryggjarí. Bryggjaríið selur tríggjar fjórðingar av ølframleiðslu síni úr egnum goymslusølum kring landið.

Hetta nervar ikki familju- og trivnaðarmálaráðharran, sum ikki hevði latið nakað tár fallið, um bæði tey føroysku bryggjaríini noyddust at sagt starvsfólki sínum upp og lata aftur.

- Í mínari verð er tað at bryggja sterkt øl ikki ein sunnur vinnuvegur. Har er nógv annað tey fólkini kundu arbeitt við. Bryggjaríini hava nógv á síni samvitsku. Tey eggja fólki til at drekka øl, og siga enntá at øl er gott fyri bæði hetta og hatta, tá øll hagtøl siga at tað er beinleiðis skaðiligt at drekka. Skal eg geva bryggjaríunum eini góð ráð, so er tað at steðga við at framleiða sterkar drykkir, sigur Bill Justinussen, familju- og trivnaðarmálaráðharri.

## Hóttir trivnaðin

Orsøkin til at Bill Justinussen, familju- og trivnaðarmálaráðharri, hevur tikið ølsølurnar hjá bryggjaríunum fram, er at hann metir tær vera eina beinleiðis hóttan ímóti trivnaðinum í økjunum, har tær liggja. Hann viðgongur, at tað ikki er hansara borð at seta fram uppskot um broytingar í Rúsdrekkalógini, sum kunnu steðga ella avmarka søluna hjá bryggjaríunum, men hann metir seg sum ráðharra við familju- og trivnaðarmálum hava eitt orð at siga um mál, sum viðkoma trivnaðinum hjá fólki her á landi.

- Í mínari verð hevði tað verið best, um einki rúsdrekka varð selt nakrastaðni. Men forboð eggja ofta til tað øvugta, og um sitandi samgonga setti forboð fyri at selja rúsdrekka, so hevði tað bara komið ein nýggja samgonga um fýra ár, sum gav loyvi aftur, sigur familju- og trivnaaðarmálaráðharrin.

## Út í óbygt øki

Familju- og trivnaðarmálaráðharrin metir tað verða rættast at kontrollera søluna av rúsdrekka so nógv sum gjørligt.

- Tað er greitt, at eingin grund er til at gera tað lættari enn neyðugt fyri fólk at fáa til vega rúsdrekka.

Tá man hevur Rúsdrekkasølu Landsins, so dugi eg ikki at síggja, hví man eisini skal selja aðrastaðni. Men um rúsdrekkasøla yvirhøvur skal fara fram, so áttu rúsdrekkasølurnar at ligið úti í óbygdum øki heldur enn at liggja mitt í bústaðarøkjum, sigur ráðharrin.

- Tá rúsdrekkasølurnar liggja mitt í býum og bygdum, gerst tað alt ov lætt hjá meinigum manni at keypa rúsdrekka. Tað hevur víst seg, at har, sum ølsølurnar eru, verður umhvørvið verri. Tað havi eg hoyrt nógvastaðni frá, bæði frá einstaklingum og frá Blákrossi, sum rættiliga hevur fingurin á pulsinum hesum viðvíkjandi, sigur Bill Justinussen, familju- og trivnaðarmálaráðharri.

## Bryggjaríiini vita um trupulleikan

Á bryggjaríunum eru tey varug við, at ølsølurnar í summum førum hava keðiliga ávirkan á umhvørvið.

- Vit vita av, at tað eru ávísir trupulleikar av fullum fólki í umhvørvinum har vit halda til. Men at niðurleggja ella flyta ølsølurnar út óbygt øki loysir ongan trupulleika, sigur Óla-Svenn Nolsøe, stjóri fyri Restorffs bryggjarí.

Einar Waag, stjóri fyri Føroya Bjór, sigur seg eisini vita hvat familju- og trivnaaðarmálaráðharri meinar við, tá hann sigur at ølsølurnar skaða trivnaðin. Men hann metir ikki at Føroya Bjór er atvoldin til slíkar trupulleikar.

- Vit ganga høgt upp í at fylgja reglunum í Rúsdrekkalógini um ikki at lata sjónliga ávirkaðum fólki øl, og so kunnu vit ikki gera meir, sigur Einar Waag.

Óla-Svenn Nolsøe hevur varhugan av, at orðini hjá familju- og trivnaaðarmálaráðharranum í stóran mun sipa til ølsøluna hjá Restorffs Bryggjaríi í Vesturbýnum í Havn.

- Tað hevði sjálvsagt havt eina ávirkan, um vit fluttu okkara sølu út í óbygt øki, og møguliga hevði umhvørvið har vit nú liggja, blivið betri. Men man hevði ikki loyst nakran trupulleika við at flyta søluna. Í besta føri hevði man flutt trupulleikan til onnur støð í býnum. Tað eru ikki ølsølurnar, men ølkeypararnir, sum í ávísum førum skapa trupulleikar fyri umhvørvið, metir Óla-Svenn Nolsøe, sum sigur seg vera sinnaðan at hjálpa familju- og trivnaaðarmálaráðharranum í royndunum at basa trupulleikunum.

## Fer at gera kanningar

Bill Justinussen, familju- og trivnaðarmálaráðharri, ætlar ikki at taka ítøkilig stig fyri at flyta ella niðurleggja ølsølurnar hjá bryggjaríunum í fyrstu atløgu, men hann fer at arbeiða víðari við málinum.

Næsta stigið hjá familju- og trivnaðarmálaráðharranum verður at dokumentera, hvussu støðan er. Hetta skal gerast við sociologiskum kanningum av trivnaðinum á ymsu plássunum í Føroyum viðvíkjandi millum øðrum rúsdrekka.

- Vísir ein kanning. at tað veruliga er soleiðis, sum eg havi fingið at vita, at ølsølurnar minka um trivnaðin í økjunnum, har tær liggja, so taki eg málið upp við vinnumálaráðharran fyri at vita hvat vit í felag kunnu gera fyri at hjálpa um hendan trupulleika.

Einar Waag, stjóri fyri Føroya Bjór, ber ikki beinleiðis ótta fyri umstøðunum hjá fyritøkuni, men heldur eitt vakið eyga við gongdini.

- Vit hava altíð havt ein ávísan ótta fyri teimum politikarunum, sum hava umsitið mál, ið viðkoma okkum. Teir hava víst eitt evni til at finna uppá at broyta lógir uttan so mikið sum at spyrja okkum, hvat tað fer at merkja fyri okkara umstøður. Nú fáa vit at síggja hvørja ávirkan nýggi ráðharrin fær á gongdina komandi árini, sigur Einar Waag, stjóri fyri Føroya Bjór.